Kommunufelagið

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
Gongin 7
Postboks 377
110 TÓRSHAVN

Dagfesting
9. februar 2024

Okkara j.nr.
24/00499-3

Málsviðgeri
JH

Tygara j.nr.
23/19835

**Viðv. uppskoti um broyting av fjarskiftislógini**

Kommunufelagið fekk 10. januar 2024 omanfyrinevnda uppskot til ummælis. Uppskotið varð viðgjørt á borgarstjórafundi í felagnum 26. januar 2024, og felagið hevur hesar viðmerkingar til uppskotið.

**Ov ógreitt, hvørjar upplýsingar talan er um**

Uppskotið kann ávirka kommunurnar á tann hátt, at kommunur kunnu krevjast at lata upplýsingar, dátur o.a., sum Fjarskiftiseftirlitið metir hava týdning fyri at kortleggja samfelagstýðandi undirstøðukervi.

Við 'undirstøðukervi' verður sum skilst sipað til fjarskiftiskervi, kt-skipanir, elveiting, vatnveiting, renovatión, vegir, tunlar, heilsuverk, almannaverk, o.s.fr. Við 'samfelagstýðandi' verður skilt virksemi, vørur og tænastuveitingar, sum eru fortreyt fyri, at samfelagið yvirhøvur virkar sum tað skal.

Kommunurnar umsita stórar partar av samfelagstýðandi undirstøðukervinum, soleiðis sum hetta er allýst omanfyri. Sannlíkt kunnu kommunurnar tí verða kravdar eftir upplýsingum hesum viðvíkjandi.

Tað tykist tó rættiliga ógreitt, hvørjir upplýsingar talan kann verða um. Felagið metir tí av praktiskum ávum, at tað eigur at vera gjørt nógv greiðari júst hvørjar upplýsingar, dátur o.a. sum kommunurnar við uppskotinum kunnu krevjast eftir.

Atlit til lutfalsmeginregluna og skynsama umsiting tala eisini greitt fyri, at landsstýrið frá byrjan ger sær greitt, hvørjir upplýsingar eru neyðugir til tess at røkka tí máli, sum uppskotið verður sagt at hava.

**Ikki røtt lóg**

Felagið hevur trupult við at síggja, hvussu ætlaðu broytingarnar sampakka við tað lógargrundarlagið, sum ætlanin er at seta nýggju reglurnar í.

Av meiri meginregluligum ávum seta vit tí týðandi spurnatekin við, hvørt tað er rætt at leggja hesar heimildir í fjarskiftislógina.

Fjarskiftislógin hevur frá byrjan havt eitt heilt annað endamál enn tað, sum hetta uppskotið leggur upp til. Fjarskiftislógin hevur í høvuðsheitum ein vælskipaðan og nýskapaðan marknað sum endamál, meðan uppskotið snýr seg um heimildir av meiri trygdarpolitiskum slagi.

Kommunufelagið ivast ikki í, at tað á ávísum økjum kann vera tørvur á rættiliga víðfevndum heimildum hjá myndugleikum. Lógin og heimildirnar mugu tó hóska saman og tað gera tær ikki í hesum føri. Ein avleiðing av hesum kann í evsta føri eisini gerast, at dómsvaldið ikki vil loyva myndugleikanum at handhevja reglurnar soleiðis, sum tær eru ætlaðar.

**Víðar heimild uttan atlit til rættartrygd og eftirlit**

Ein avleiðing av uppskotinum er somuleiðis, at virkisøkini hjá innlitslógini, dátuverndarlógini og skjalasavnslógini verða skerd munandi. Hetta verður gjørt uttan at samsvarandi reglur ella fyriskipanir verða settar í verk, og hóast serliga innlitslógin og dátuverndarlógin eru viðvirkandi til at halda uppi rættartrygdina hjá borgarum, virkjum og øðrum samfelagsaktørum.

Avleiðingin av hesum verður, at máað verður undan rættartrygdini í samfelagnum. Tað er ógvuliga undranarvert at uppskotið ikki fyriheldur seg til hesi viðurskiftini – hvørki til undirliggjandi samfelagstýdningin av hesum lógum ella til ítøkiligu undantøkini, sum hesar lógir longu loyva.

Lógaruppskotið hevur heldur ikki nakra støðutakan til, hvussu eftirlit verður hildið við nýtsluni av nýggju og sera víðfevndu heimildunum hjá Fjarskiftiseftirlitinum.

Eitt grundleggjandi eyðkenni fyri fólkaræðislig samfeløg er annars, at tey hava eftirlit við sínum myndugleikum og at hetta eftirlit skal hava møguleika vera effektivt. Vanliga verður eftirlitið útint av hægri fyrisitingarligum ella politiskum myndugleika, meðan eftirlitið í øðrum førum liggur hjá dómsvaldinum ella serliga skipaðum eftirliti.

At síggja til verður onki fyrisitingarligt ella politiskt eftirlit skipað fyri umsitingina av hesum nýggju og víðfevndu heimildunum hjá Fjarskiftiseftirlinum. Og av tí, at stovnurin millum annað fær heimild at strika upplýsing ber somuleiðis illa til hjá nøkrum at skipa nakað effektiv eftirlit – ei heldur gjøgnum dómsvaldið.

**Bíðið eftir nettrygdarlóg**

Samanumtikið heldur felagið fleiri týðandi viðurskifti tala ímóti at samtykkja uppskotið í verandi líki. Felagið mælir av somu orsøk frá at landsstýrið ber hetta uppskotið í tingið.

Mælt verður í staðin til at bíða eftir einari meiri samanhangandi regulering, har neyðug atlit kann takast til tey sera samansettu – og eins samfelagstýðandi – atlitini, sum eitt slíkt uppskot eigur at fevna um og taka støðu til.

Hetta kann hóskandi gerast í tí nettrygdarlóg, sum landsstýrið longu sigur seg arbeiða við at leggja fram í komandi tingsetu.

Vegna
Kommunufelagið

Torbjørn Jacobsen
formaður

Eyðun Christiansen
stjóri

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo_ · Heimasíða: www.kf.fo